## DAGSINS MEINING

# Fyrsti mai og blindar marknaðarkreftir

Fyrsti mai, altjóða dagur verkafólksins, er farin aftur um. Í meira en stórthundrað ár hevur hesin dagur verið nýttur til at minna á stættastríð, at seta fram krøv og at vátta samanhald og samhaldsfesti. Støðan hjá verkamannarørsluni í Vesturheiminum er nógv broytt seinastu árini. Tá múrurin fall broyttist alt. Við altjóðagerðini hava tær blindu marknaðarkreftirnar fingið ræðið.Hesar kreftir ráða í Føroyum eins og í øllum heiminum. Tær tykjast ráða í Føroyum uttan mun til hvønn politiskan lit einhvør sitandi samgonga hevur. Stættastríðið verður lýst deytt at vera!

Stættastríðið er ikki horvið, men hevur heldur skift innihald. Nú er meira tala um eitt altjóða stríð, um eitt stríð millum teir heimspartar, ið sita við yvirflóð av øllum neyðsynjar- og brúkaravørum og so teir partar, ið einki hava. USA ræður einsamalt í heiminum í dag. USA og amerikanska nýkonseratisman seta dagskránna og hesi skrá noyðast øll heimsins lond at fylgja, antin teimum líkar tað ella ikki. Eitt úrslitið av hesi gongd er, at egoisman og individualisman dominera samfelagsmyndina uttan mun til, hvar vit eru stødd. USA roynir við einum sera miðvísum og vælskipaðum politikki at noyða amerikanska mentan og amerikansku heimsmyndina inn á øll heimsins lond. Tey sameindu hjá USA eru fyrst og fremst málið fyri hesari strategi. Og væl tykist bera til. Næstan øll eru við í kórinum: borgarligir politikkarar, embætismenn og fyrrverandi maoistar, vinnulívsfólk, miðlafólk, ES byrokratar og stórir partar av tí nýggja sosialdemokratiska rákinum í Europa.

Í hesi heimsmyndini kunnu fakfelagsfólk tykjast eitt sindur einsamøll og stríð teirra kann næstan tykjast vera til fánýtis. Samhaldsfesti er líkasum ikki in í løtuni hjá tí breiða almenninginum í vesturheiminum. Tað kann vera mikið uppfrískandi at hoyra ein føroyskan tingmann tann fyrsta mai á Vaglinum dundra móti kapitalistum, pamparum, embætismonnum, akademikarum, javnaðarmonnum og tí, sum verri er. Men hvussu er vorið tá gerandisdagurin kemur? Hvør vil tá bróta nasar? Hvør torir í dag at siga, at vit ikki skulu hava marknaðarbúskap? Hvør torir erliga at fara út at greiða fólki frá, hvussu hetta samfelagið sær út eftir t.d. 25 ár við marknaðarbúskapi? Hvør torir at taka sosialismuna uppá tungu? Hvør politikkari ella hvør politiskur flokkur droymir í dag um at fara út við eini politiskari skrá, sum byggir á stættastríð og planbú-skap? Hetta er ein trupul støða hjá verkamannarørsluni. Í hesi rørslu eru tey fókini síðstu eftir, sum trúgva á samhaldsfesti og á eitt mannavinarligt og humant samfelag. Um ikki dreymurin um eitt utopiskt samfelag yvirlivir sína vetursetu í hesi rørslu, tað verið seg í Bretlandi, Fraklandi, Danmark ella í Føroyum, er lítil vón um eitt solidariskt samfelag, har fá hava ov mikið og færri ov lítið. Hetta er ein løgin tíð, har spurnartekin verður sett við mong virði, eisini við tey virði, ið fakfelagsrørslan úti og heima hevur vart, varðveitt og barst fyri síðan Marx, Stauning og P.M. Dam vóru á lívi. Her er enn nógv virðismikið at stríðast fyri, men neyðugt verður at endurskoða mál og innihald í hesum stríði, um rørsluni skal vera lív lagað.Vit her á blaðnum ynskja føroysku fakfelagsrørsluni góða eydnu í framtíðini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ríkisflagg - listaverk ella níðingsverk?

**Svein Askildsen**

Tað munnu vera nógv sambandsfólk, sum eru ørg inn á at eitt uppskot um ríkisflagg skuldi gerast høvuðsevni eftir 65 ára haldið fyri merkinum. Men hóast aftursvísingar frá sambandsflokkinum og javnaðarflokkinum, so eru hesir flokkar íblásturin og vónin hjá hesum entusiastum, sum vilja merkinum til lívs.

Flaggdagsrøðan í Havn endaði við avdúking av einum uppskoti til ríkisflagg, sum má sigast at vera ein stór vanvirðing av merkinum og øllum tað stendur fyri. Um ætlanin við provokatiónini var at skapa orðaskifti um støðu okkara sum tjóð millum aðrar tjóðir, ja, so vísir uppskotið bert, at Føroyar als ikki eru til. Merkið, sum sjálvt reinførastu sambandsfólk í dag eru stolt av og góð við, er ein av týdningarmestu varðunum í stríði føroyinga fyri viðurkenning sum serstøk og fræls tjóð.

Nú skriva damurnar aftan fyri uppskotið, at Union Jack er eitt gott dømi um sameining av fløggum millum tjóðir. At ein so lærd dama sum Malan Marnersdóttir skal gera slíka samanbering undrar meg, tí tað passar ikki við vanliga sunna fornuft. Union Jack hevur sína serligu søgu, sum snýr seg um, at James VI kongur í Skotlandi arvaði trúnuna í Onglandi í 1603 eftir Elisabeth I, og gjørdist sostatt James I av Englandi. James I gjørdi av at kalla seg kong av Stórabretlandi - Great Britain - eitt smikrandi heiti, sum klingaði væl, og sum hevur hingið við til hendan dag, hóast United Kingdom sum seinni kom at vera fornavn fyri Great Britain, og sum fevnir um tvey lond afturat, við tíðini gjørdist tann betri hóskandi og vinnandi parturin av heitinum fyri bretska sambandsríkið. Men aftur til Union Jack.

James I av Stórabretlandi fekk ein trupuleika tá kongsins skip skuldu flagga. Talan var jú um sjálvstøðugar tjóðir við hvør sínum parlamenti, hvør sínum flaggi osfr., hóast sami maður nú var á trónuni í londunum báðum. Onglendingar vildu ikki vita av skotska flagginum, "St. Andrew's cross", við tí bláa dúkinum og diagonala hvíta krossinum, og skotar vanvirdu enska flaggið, "St. George's cross", við tí hvíta dúkinum og reyða krossmerkinum. So hvørji ráð vóru nú til at taka? Jú, ein vøkur samanrenning av báðum fløggunum varð gjørd, og tað fyrsta "sambandsflaggið" hjá James VI/I ella Jack, sum flaggið varð uppkallað eftir, var veruleiki, og í 1606 fingu øll kongsins skip boð um at sigla undir Union Jack. Ikki fyrr enn í 1707 kom ein nýggj "Act Of The Union", sum sameindi Skotland við Wales og Onglandi til eitt kongaríki við einum felags parlamenti undir heitinum "United Kingdom of Great Britain". Men so gingu 100 ár afturat, og í 1801 lá enn eitt sambandsskjal á borðinum, tí Írland kom uppí. Írar høvdu, sum teir hava enn ídag "cross of St. Patrick", við hvítum dúki og einum reyðum diagonalum krossi, og hesin passaði inn í "Union Jack-myndina", og soleiðis fingu bretar eina nýggja útgávu, kanska eina meira fullkomna ella endaliga sniðmynd, av Union Jack, sum hevur verðið brúkt síðani. Sniðsøgan um Union Jack sigur hinvegin einki um Wales, sum kom undir bretskt vald longu í 13. øld og við lóg gjørdis partur av Onglandi í 1536. Union Jack sigur heldur einki um skrædli millum Írland og Stórabretland, sum førdi við sær stríðið um Norðurírland, sum er eitt tað longsta og blóðugasta stríðið í og ímillum tjóðir á okkara leiðum í nýggjari tíð. Øll londini í Stórabretlandi - Ongland, Wales, Skotland og Norðurírland - gera nú meir og meir burtur úr sínum egna flaggið og tjóðskapi. Trongdin eftir at vera óheftur og sjálvstøðugur tykist størri og veksandi hjá øllum londunum í hesum felagsskapi, og flaggið er eitt tað besta amboðið at savna tjóðina til samanhald í eini tíð, har globaliseringin ella altjóðagerðin er í fer við at gera bæði tjóðir, og menniskju sum heild, anonym og týdningarleys.

Í dag verður als ikki mett, at Union Jack hevur nakra bjarta framtíð - heldur tvørturímóti. Uttanfyri ST-høvuðsborgina verður Union Jack saman við Dannebrog og øllum hinum fløggunum hjá ES-limalondunum óiva um stutta tíð skift út við EITT ES-flagg, sum er so smart gjørt, at um vit ein dag velja at gerast limir, so fær ES-flaggið bara eina gylta stjørnu afturat á tann bláa dúkin.

Nei, hetta er ikki tíðin til eitt ríkisflagg. Enn hava vit ikki tjóðarfrælsi; enn hava vit ikki fingið altjóða viðurkenning sum fólk av dønum; enn kunnu vit ikki tala okkara egnu søk í altjóðasamfelagnum.

Har merkið veitrar, har tala føroyingar søk føroyinga. Eingin skal billa mær inn, at danir fara at tala okkara søk betri, um eitt missfostur av einum flaggi, sum skal eitast at umboða ríkisfelagsskapin, bleiktrar uttan fyri ST- ella NATO-høvuðsborgirnar. Tað er bara ófatuligt, at eitt slíkt ivasamt flagg, sum eins væl kann kallast eitt níðingsverk sum eitt listaverk, skal sleppa at hanga uppi í listaskálanum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.